lívdin
- í lívd hins hægsta

Apríl 2007



# Spennandi og mennandi uppgáva



Tørvur er á fólki til at stilla upp ljóðútgerðina leygardagar. Hóast hetta í fyrstu syftu kennist fremmant fyri tær, skalt tú ikki lata teg ræða – tú verður ikki sleptur uppá fjall.

Allar eindir og leidningar eru merkt, og tú fært neyðuga hjálp frá serkønum fólki, líka til tú kennir teg tryggan og meistrar at stilla upp og binda í sjálvur.

Tørvur er eisini á ljóðtøkningum. Her verður sjálvandi eisini frálæra givin, sum skal gera teg føran fyri at sita við ljóðpultin sunnudagar. Tær fyrstu ferðirnar sum varamaður, men upp á sikt í „førarastólinum“.

Uppgávan er sera spennandi og mennandi. Sum ljóðtøkningur ert tú í toymi saman við tónleikarum og sangarum. Tú ert partur av øllum, frá tí at byrjað verður at venja, áðrenn møtið og til endan.

Tað er ein fyrimunur, um tú ert tekniskt „mindaður“ og hevur „oyra fyri tónleiki“.

Áhugað kunnu venda sær til Árna Hansen, tel. 22 98 94 ella Svend Åge Drewsen tel. 21 03 28.

**Minnist til at siga okkum frá!**

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um okkurt er, sum tit ynskja at fáa við í faldaran, eitt nú børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp og annað.

Í sambandi við rundar føðingardagar, skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85 ár o.s.fr.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo

## Hvat segði Hann?

Hvussu mundu tey 15.000 menniskjuni hoyra Jesus, tá ið Hann talaði til teirra? Hvussu mundi Ísraelsfólk hoyra, tá ið Móses talaði til teirra í oyðimørkini? Hvussu mundi tann stóra fjøldin í Jerúsalem hoyra Pætur, tá ið hann prædikaði á hvítusunnu, og 3000 sálir vórðu frelstar?

Eg veit ikki, hvussu teir kláraðu seg uttan mikrofonir, annlegg og hoytalarar! Men eg trúgvi, at mong hava sagt, "Hvat segði Hann? Eg hoyrdi ikki!" Eg veit bara tað, at tá vit eru so mong fólk á møti í Lívdini sunnumorgun, er tað trupult at hoyra um anleggið ikki er innstillað rætt. Latið okkum takka teimum, sum eru í ljóðtænastuni fyri góðu tænastu teirra.

*„Verið tí fastir, elskaðu brøður mínir, óvikiligir, altíð ríkir í verki Harrans! Tit vita jú, at arbeiði tykkara er ikki til einkis í Harranum!"*

(1. Kor. 15:58)



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini



## Tillukku við føðingardegnum

**Erling Bech 60 ár**

Leygardagin 10. mars var opið hús á Sundsvegi 20 í Havn í sambandi við, at Erling Bech fylti 60 ár.

Erling er ættaður úr Vági. Hann hevur búð í Havn, síðan hann var 16 ára gamal og er útbúgvin møbilsnikkari, men hann dugir alt "millum himmal og jørð".

Erling er giftur Ásu, f. Hansen, úr Havn. Tey eiga fimm børn: Poul, Maria, Irena, Høgni og Helgi. Barnabørnini eru 8 í tali.

Síðan 1967 hevur familjan búð á Ternuryggi, og síðan 1983 hava tey rikið handilin Ternubúðina, sum telist millum teir størru handlarnar í býnum.

Vit í samkomuni hava notið nógv gott av góðu hugskotunum og kreativu evnunum hjá Erlingi. Tað ynskja vit eisini at takka honum fyri.




## Tillukku við hjúnabandinum

**Føroyingar í brúdleypi í Nairobi**

Leygardagin 14. oktober 2006 giftust í Nairobi í Kenya Ingi Kirke úr Kaldbak og Kathrine Mayodi úr Nairobi. Ingi er sonur Jettu og Álv Kirke í Kaldbak.

Álvur Kirke, saman við soninum Petur og konu hansara Adelaid, vóru við til brúdleypið. Eisini vóru Malena og Jens Meitilberg úr Havn saman við tveimum føroyskum gentum, sum øll arbeiddu á einum barnaheimi í Nakuru, 3-4 tímar frá Nairobi.



*Álvur Kirke (t.h.) í Nairobi saman við Malenu og Jens Meitilberg úr Havn og tveimum føroyskum gentum.*

## TILTØK Á BREKKU 3
(bygningurin aftan fyri MBM)



Á Brekku 3

Undirvísing og „bøn og bønarskúli“ týskvøld kl. 20.00
*(Triðja hvørt týskvøld eru húsbólkar)*

3. apríl. Húsbólkar

10. apríl. „*Forðingar fyri bøn*“. Talari: Jógvan Zachariassen

17. apríl. „*Tá bønin kølnar*“. Talari: Jógvan Zachariassen

24. apríl. Húsbólkar.

**Bønarløta** fyri ung er mikudag kl. 18

**Ungdómsmøti** er fríggjakvøld kl. 20.30

### SMS-skipanin hjá teimum ungu
Um tú vilt vera við í SMS-skipanini hjá teimum ungu í Lívdini, skriva so: „Liv ung tilmeld“ (síðan títt fornavn og eftirnavn) . Send til: 591901

## Hey gentur í Lívdini!

„Hosianna“ er bíbliuundirvísing og annað fyri gentur frá 12-15 ár. Vit møtast hvørt mikukvøld, har vit skifta um undirvísing við aðrar aktivitetir sum t.d. svimjing, spøl, eta saman og hyggja at filmi.

Vit gleða okkum, til at vit eisini kunnu hava drama, tónleik ella okkurt annað, til at tilbiðja Gud við.

Um tú vilt vita meira um Jesus og kennir onnur sum elska Hann, tosa endiliga við Ildu Lómstein ella melda teg til á: liv gb1 til (fornavn og eftirnavn) og send tað til tel. 591901.

Vælkomin!



*Ilda Lómstein*

## Malin Zachariassen vitjaði

Fyri jól í fjør var Malin Zachariassen og vitjaði okkum og sang á møtinum.

Malin og maðurin, Jan Zachariassen av Argjum, vóru virkin í Lívdini til tey í desember 2003 fluttu til Svøríkis at búgva. Tey búgva í Malmø saman við synunum Eliasi og Jákupi, sum ganga á einum kristnum forskúla og barnagarði, har serligur dentur verður lagdur á tónleik. Familjan gongur í eini samkomu har í býnum.

Malin er svensk, úr býnum Nora, 30 km norðan fyri Ørebro. Hon er útbúgvin sjúkrasystir og arbeiðir á einum sjúkrahúsi í Malmø. Mailin hevur eisini givið út fløgu við egnum sangum.

Vit ynskja teimum alt tað besta og vóna at síggja tey skjótt aftur.



*Malin Zachariassen*

## Treytaleysur kærleiki

“Et af de smukkeste eksempler på, hvorledes kærlighed kan omsættes til praksis, har jeg hørt fra Moder Teresa. En journalist, som iagttog hendes arbejde i Calcuttas slum, sagde til hende: “Sådan et arbejde ville jeg ikke påtage mig for en dagløn på tusinde dollars”. Denne ordenskvindes kvikke og fantastiske svar lød: “Det ville jeg heller ikke”. Det er betingelsesløs kærlighed.

*„Omsorgsfulde relationer“*, síða 22.

* Gunnar Nielsen nevndi hetta í Lívdini ein sunnumorgun.



*Móðir Teresa (1910-1997)*

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



### Sunnudagin 1. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni.*
*Talari: Pauli Olsen.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið: „Pálmasunnudagur“.*
*Talari: Jógvan Zachariassen.*

### Sunnudagin 8. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: „Uppreisn hinna deyðu er vón okkara“.*
*Talari: Johnny í Grótinum.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Páskamorgun: Páskir.*
*Talari: Absalon Áargarð.*

### Sunnudagin 15. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni.*
*Talari: Svenning av Lofti.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið.*
*Talari: Jógvan Zachariassen.*

### Sunnudagin 22. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Sangløta og yndissangir.*
*Talari: Dánjal Pedersen.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið.*
*Talari: Jógvan Zachariassen.*

### Sunnudagin 29. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Sangmøti.*
*Talarar: Fleiri (Rúni Lómstein ábyrgd).*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Ein ferð í lovsongi.*
*Talari: Anna Háberg.*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*